# 2010 JUNI

## Jollaði sær í Føroyum

*76 ára gamli prinsgemalurin Heindrikkur jollar sær ordiliga í Føroyum, tá ið hann og Margretha drotning eru á vitjan. Danir finnast mangan at prinsgemalinum. Hann dugur ikki nóg væl danskt, hann er ov tjúkkur, drekkur ov illa, kennir ikki sítt pláss og er ofta ófantaligur í almennum høpi. Men øll hesi lýti verða við eitt snarað á, tá prinsgemalurin kemur til Føroya. Her taka fólk kanska ikki formalia so tungt, og franska lyndið hóskar væl til avslappaðu formarnar í Føroyum.*



### Posta yvirtók útbering

Útberingin hjá Prentmiðstøðini, sum í nøkur ár hevur kappast við Posta, steðgar. Nevndarformaðurin í Prentmiðstøðini, Árni Ellefsen, sigur, at útberingin gevur hall, og vónir eru ikki um, at gongdin fer at venda. Tí yvirtekur Posta útberingina hjá Prentmiðstøðini. Umleið 300 fólk hava verið knýtt at útberingini hjá Prentmiðstøðini.



### Immi fekk atgongumerki

Imme Dam kom í miðdepilin, tá ið hann talaði ímóti, at heimskendi bretski sangari Elton John kom til Føroya at spæla konsert. Hann var boðin í studio á Rás2, og har greiddi hann frá sínum sjónarmiðum.

- Eg havi í hvussu er biðið Harran um, at hann forðar fyri, at konsertin verður til nakað, og Hann hoyrir bønir, segði Imme Dam.

Hann fekk eisini eitt atgongumerki til konsertina frá Barbaru Holm, verti í sendingini, og hann tók ímóti tí.

- So veit eg, at tað verður ein áhoyrari færri til konsertina, segði hann.



### Listasavnið fekk Bládýpið

Tað stóðst rok av listarligu bingjuni hjá Tróndi Patursson, tá ið leiðarin fyri Listasavnið ikki vildi kennast við hana. Men eftir samrøður millum partarnar endaði tað við, at Listasavnið tók ímóti Bládýpinum, og nú skal verkið, sum hevur ferðast víðahvar, umvælast. Verkið skal gerast partur av føstu framsýningini á Listasavninum.

# Færri koyra við kenning

**Talið á bilførarum, sum verða tikin fyri at koyra við kenning, er nú tað lægsta í 10 ár. Jón Klein Olsen, løgreglumaður, heldur, at hetta er úrslitið av einum miðvísum arbeiði, sum higartil hevur vart í fleiri ár**




*Alsamt færri føroyingar verða tiknir fyri at koyra við kenning*

Tað er ikki longur cool at koyra við kenning!

Tað staðfestir Jón Klein Olsen varapolitiinspektørur.

Nýggjastu hagtølini hjá løgregluni vísa, at talið á bilførarum, sum verða tiknir fyri at koyra við kenning er nú tað lægsta síðani í 1999, altso tað lægsta í heili 10 ár.

Hetta eru tøl, sum Jón Klein Olsen, fegnast um.

- Tølini eru farin tann vegin, eg vónaði, sigur hann.

Hinvegin staðfestir hann, at tølini skulu takast við einum ávísum fyrivarni, tí hagtøl kunnu broytast rættiliga nógv ár undan ári.

Kortini hevur hann eina kenslu av at hesi seinastu árini hevur gongdin verið, at færri og færri koyra ávirkað av rúsdrekka.

### Hevur tikið fleiri ár

Hann heldur seg hava staðfest, at hesi síðstu árini er hend ein stór hugburðsbroyting, sum ber í sær, at tað er blivið ómodernað at koyra við kenning.

Men hendan hugburðsbroyting er sanniliga ikki komin av sær sjálvum.

- Tað eru nógv viðurskifti, sum gera seg galdandi og sum tilsamans føra til, at rúsdrekakkoyring minkar, men tað tekur langa tíð at broyta hugburðin hjá fólki.

Hann vísir á, at nú í nógv ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd ført eina miðvísa upplýsingarherferð í skúlunum, har eisini løgreglan og sjúkraflutningstænastan hava verið við.

- Vit merkja, at hetta setir síni spor hjá teimum allarflestu, sigur Jón Klein Olsen.

Hann ivast ikki í, at hendan upplýsingin í skúlunum er ein orsøk til, at tað er ikki longur at tað er ikki cool at koyra við kenning longur.

### Løgreglan vísir seg

Ein kundi eisini freistast til at hildið, at ein orsøk til, at færri verða tikin fyri rúsdrekkakoyring, er tann, at løgreglan ger minni burtur úr at kanna bilførarar, enn hon hevur gjørt.

Ongi hagtøl finnast um hetta, tí hagtalsskipanin er løgd um, so at tað ber ikki til at finna samanberandi hagtøl enn, sigur Halldis Poulsen, fyrisitingarligur leiðari hjá løgregluni.

Men Jón Klein Olsen heldur ikki, at tað er orsøkin.

Tvørturímóti sigur hann, at løgreglan er so nógv úti á vegunum, sum tilber.

- Vit leggja dent á at vera sjónlig á vegunum. Serliga tá ið stór veitslukend tiltøk eru, har nógv fólk savnast, gera vit nógv burtur úr at vísa okkum, sigur hann.

Hann heldur eisini, at tað hevur sína ávirkan, at fjølmiðlarnir gera burtur úr, tá ið vanlukkur henda.

> *Eg havi kanska eitt "orsaka eg eri til" syndrom, sum møguliga er hykleriskt. Man vil jú ikki trýsta seg framat.*
> **Jóanes Nielsen, skald**

> *Av teimum støðum, eg kenni, eru Føroyar numero uno! Hóast religión og sambandshugsjón fylla og nógv.*
> **Eyðun Nolsøe, tónleikari**